**Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil:**



1. *Hvør vinnur steypafinaluna millum VÍF og StÍF?*
- Eg rokni við, at VÍF vinnur, tí teir eru sera væl fyri í løtuni. Gott nokk kann alt henda í eini finalu, men formurin talar fyri vestmenningum. Eg tippi 29-24 til VÍF.
2. *Hvør verður lyklaleikarin hjá VÍF?*
- Tað eru uttan iva Ingi og Sámal, soleiðis sum teir koyra í løtuni.
3. *Hvør verður lyklaleikarin hjá StÍF?*
- Tað verða Sveinur Justinussen og Marian í málinum.
4. *Hvørji góð ráð hevur tú til VÍF?*
- Tað má verða at koma skjótt heim í verjuni, og at hava eina aggressiva verju. Somuleiðis er umráðandi at steðga kontraspælinum hjá StÍF.
5. *Hvørji góð ráð hevur tú til StÍF?*
- Tað má fyrst og fremst verða at steðga skjúttunum hjá VÍF, tí teir vísa seg at verða størsti styrkurin hjá teimum í løtuni.

**Halgir Dahl Olesen:**



1. *Hvør vinnur steypafinaluna millum VÍF og StÍF?*
- Eg vænti, at VÍF vinnur. Tað verður javnt, men 25-23 til VÍF..
2. *Hvør verður lyklaleikarin hjá VÍF?*
- Tað verður uttan iva Ingi Olsen.
3. *Hvør verður lyklaleikarin hjá StÍF?*
- Hjá StÍF eru tað fyrst og fremst Sveinur Justinussen og Marian í málinum.
4. *Hvørji góð ráð hevur tú til VÍF?*
- Eg hevði ikki ivast í at vart 6-0. Eisini ræður um ikki at skjóta Marian heitan beinan vegin, tí so er hann ikki at steðga. Eisini er umráðandi at fáa verjuna at koyra.
5. *Hvørji góð ráð hevur tú til StÍF?*
- Tað má verða at skora upp á brotskøst. Somuleiðis er tað umráðandi, at VÍF ikki fær tey løttu málini upp á kontra, tí fáa teir vind í segluni, eru teir ógvuliga truplir at steðga.

**Áki Mørk, Neistin:**



1. *Hvør vinnur steypafinaluna millum VÍF og StÍF?*
- Tað er púra opið. StÍF liggur væl til VÍF, men VÍF tykist hava munin á strandingum í ár, og eg vænti, at VÍF vinnur við tveimum málum.
2. *Hvør verður lyklaleikarin hjá VÍF?*
- Tað verður Ingi og so antin Dejan ella Eli í málinum.
3. *Hvør verður lyklaleikarin hjá StÍF?*
- Hjá teimum hevur tað alt at siga, hvussu Marian stendur seg í málinum.
4. *Hvørji góð ráð hevur tú til VÍF?*
- Tað er at hava tol og ikki spæla ov skjótt. Móti StÍF ræður um at hava lang álop, tí teir hava ikki tol til at standa í verjuni so leingi.
5. *Hvørji góð ráð hevur tú til StÍF?*
- Tað má so verða at fáa nógv skjótt spæl, og at fáa gongd á eyðkenda kontraspælið hjá sær.

**Óla Kristjan Djurhuus, KÍF:**



1. *Hvør vinnur steypafinaluna millum VÍF og StÍF?*
- Eg rokni við, at tað verða strandingar, sum vinna. Tað verður tætt, men tað verður einastaðnis har mitt í 20-unum.
2. *Hvør verður lyklaleikarin hjá VÍF?*
- Tað verður málmaðurin, og eg vænti, at í finaluni verður tað Eli Müller, sum fer at standa seg best. Men Ingi hevur eisini stóran týdning.
3. *Hvør verður lyklaleikarin hjá StÍF?*
- Tað er einki at ivast í, at Marian í málinum hevur ómetaliga stóran týdning fyri strandingar.
4. *Hvørji góð ráð hevur tú til VÍF?*
- Tað er at dekka upp fyri kviku spælarunum hjá strandingum, og harvið steðga kontraspælinum hjá teimum. Tí ræður tað eisini um hjá VÍF at koma skjótt heim aftur í verjuna.
5. *Hvørji góð ráð hevur tú til StÍF?*
- Fyrst og fremst ræður um hjá StÍF, at teir megna at steðga teimum báðum Inga Olsen og Sámal Joensen, so at teir ikki koma ov gott í gongd.

# Full høll

**Bæði á Strondum og í Vestmanna er spenningurin stórur undan finaluni í dag, og teir báðir Áki G. Olsen hjá VÍF og Alexandur Johansen hjá StÍF vænta eina full høll av spentum áskoðarum.**

ÁSKOÐARAR
*Terji Nielsen, terji@sosialurin.fo*

Júst VÍF og StÍF eru tvey av best stuðlaðu liðunum í hondbóltskappingini hjá monnum. Hesi bæði lið hava altíð eina rúgvu av sínum trúfastu áskoðarum við sær, tá ið tey ferðast kring landið til dystir. Í dag fara hesir áskoðarar uttan iva at seta sín dám á karmarnar til steypafinaluna.

### Skipað fyri bussferð

Alexandur Johansen hjá StÍF sigur, at á Strondum eru tey øgiliga spent til finaluna, og at felagið hevur skipað fyri bussferðum til Havnar til dystin, og hann ivast ikki í, at strandingar koma manssterkir til høvuðsstaðin.

- Áskoðararnir eru trúfastir hjá okkum í landskappingini, og nú vit spæla steypafinalu, verða teir óivað væl fleiri enn vanligt, og tá eru teir nógvir, sigur Alexandur.

Eisini í Vestmanna er nógv hondbóltsprát í hesum døgum. - Vestmenningar eru spentir til dystin, og tað er einki at ivast í, at tað verður tómligt í Vestmanna, tá ið finalan verður spæld, tí tað fer maður av húsi til Havnar, sigur Áki G. Olsen. Sum nevnt aðrastaðnis á síðuni, so eru vestmenningar sera svangir eftir einum steypasigri, og trúgva áskoðarafjøldin hjá VÍF ætlar sær at gera sítt til, at vestmenningar fáa steypið við norður aftur til Vestmanna.

# Spennandi í Klaksvík

**Bert tveir dystir eru á skránni í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen, terji@sosialurin.fo*

SÍ tók seinasta sunnudag eitt stórt fet móti FM-heitinum, tá ið teir vunnu ein tryggan sigur á nærmastu kappingarneytunum úr Mjølnir.

### Havnarmenn vitja í Klaksvík

Sørvingar fáa sunnudagin vitjan av botnliðnum Fram, og tað er lítið at ivast í, at SÍ má metast sum stórfavorittur til at vinna dystin. Gamaní hevur Fram fleiri góðar spælarar, men enn hava teir ikki fingið tað heilt stóra burtur úr í ár.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnum verður í Klaksvík, har Mjølnir fær vitjan av Fleyr. Hesin dysturin millum teir báðar gomlu arvafíggindarnar í føroyskum flogbólti kann gerast rættuliga spennandi, tí Fleyr við einum sigri kann av álvara fara at hótta silvurplássið hjá klaksvíkingum.

Spurningurin er eisini, um Mjølnir fær reist seg eftir ósigurin í Sørvági seinasta sunnudag, tí tað var ein dyggur smeitur fyri klaksvíkingar.

# Dráttur bjóðar oddaliðnum av

**Tríggir dystir í meistaradeildini hjá kvinnum verða um vikuskiftið, og oddaliðið Mjølnir fær óivað ein harðan dyst, tá ið Dráttur, sum seinasta vikuskifti koppaði TB í Trongisvági, kemur á vitjan**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen, terji@sosialurin.fo*

Tað er nógv, sum bendir á, at kappingin um føroyameistaraheitið í flogbólti hjá kvinnum longu er avgjørd til fyrimuns fyri Mjølnir, men sjálvar vilja klaksvíkskvinnurnar ikki hoyra talan um hetta.

### Hava virðing fyri Drátti

Fyrr í vikuni segði ein av leikarunum hjá Mjølnir, Vera Larsen, her í blaðnum, at tær mettu dystin sunnudagin móti Drátti í Klaksvík sum ein sera truplan dyst, ið kann koma at hava avgerðandi týdning í stríðnum um meistaraheitið.

Dráttur vann farna vikuskifti rættuliga óvæntað á hinum oddaliðnum TB í Trongisvági, og harvið syrgdu kvinnurnar úr Vágum fyri, at gullið so gott sum er í hondunum á Mjølnir. Men vinnur Dráttur á Mjølnir sunnudagin, so kann spenningur koma í aftur kappingina.

TB skal í dyst í dag, tá ið tær fáa vitjan av ÍF. Tað er lítið at ivast í, at heimaliðið fer at gera sítt til at reisast eftir ósigurin farna vikuskifti, og dysturin móti fuglfjarðakvinnum er eisini ein seinasti møguleiki at fínpussa formin undan steypafinaluni móti Mjølnir, sum verður um eina viku.

Triðji dysturin í meistaradeildini hjá kvinnum hetta vikuskifti verður í morgin, tá ið botnliðið SÍ fær vitjan av einum øðrum botnliði KÍF. SÍ hevur bitið væl frá sær í seinastuni, og møguleiki er fyri, at sørvágskvinnur fáa nøkur stig til høldar í morgin.